## DAGSINS MEINING

### Fíggjarlógin má takast í álvara

Áhugavert var at hoyra Torbjørn Jacobsen fíggjarnevndarlim fyrr í vikuni, har hann helt fast um, at eykajáttanir skulu verða útreiðsluneutralar, tí tað er vorðið ein ósiður, at eykajáttan omaná eykajáttan úthola tað ætlaða yvirskotið á fíggjarlógini.

Torbjørn Jacobsen hevur grein í sínum máli, at eykajáttanarlógir eru ein ósiður. Ein eykajáttan eigur at verða eitt amboð til at brúka undantaksvís. Sjálvandi kann altíð okkurt koma fyri, soleiðis at ein eykajáttan kann verða neyðug, men undir vanligum umstøðum er ein eykajáttan einki annað enn eitt yvirtrekk í mun til fíggjarætlanina.

Trupuleikin hjá Torbjørn Jacobsen og tinglimum annars er bert, at málið um ongar eykajáttanir, ið ikki eru útreiðsluneutralar, ber ikki til at uppfylla, uttan so at tvey ting verða broytt.

Tað fyrsta er, at Fíggjarlógararbeiðið má gerast betur. Tað ber ikki til, at Landstýrismaðurin í Fíggjarmálum konsekvent undirbudgetterar, soleiðis at stovnsleiðarar og onnur hvørt ár mugu fíggja lønarhækkanir av rakstrinum. Tá ein stovnsleiðari kemur við einari fíggjarætlan, so má man ganga útfrá, at hetta er ein vælumhugsað ætlan, ið ikki er skrivað til stuttleikar. Tað, sum tiveri alt ov ofta hendir er, at Fíggjarmálastýrið uttan í øllum førum at hava neyðuga innlitið, skarvar av pr automatikk. Úrslitið av hesum kann verða, at stovnar og onnur konsekvent royna at yvirbudgettera fyri at fáa neyðugu játtanina. Eisini talar talið av eykajáttanum fyri seg. Ein góður landsstýrismaður í Fíggjarmálum eigur at verða vurderaður eftir, hvussu væl fíggjarlógin heldur. Ikki sær tað pent út farnu árini.

Hin grundleggjandi trupulleikin, ið má loysast, skal málið hjá Torbjørni Jacobsen røkkast, er játtanarskipanin. Vit hava á hesum stað í fleiri ár funnist at játtanarskipanini, ið reduserar almennar stovnsleiðarar til administratorar. Játtanarskipanin er skeiv, tí hon ikki letur landstýrisfólki og stovnleiðslum rammujáttanir, sum vit kenna tað frá øðrum londum. Um Løgtingið ikki hevur so frætt av áliti á einum landstýrisfólki, at hetta ikki av einari rammuáttan til ferðafólkaflutning kann sleppa at játta pening til máling á strandfaraskip, uttan Løgtingið skal uppí, so hava teir ikki valt rætta landstýrisfólkið. Eisini mugu landstyrisfólk hava so frætt álit á stovnleiðslum, ið verða betaltar til tað sama, at hesi kunnu disponera rímiliga frítt yvir sínari játtan. Lønir er tó undantikið, tí hetta hevur eina serstøðu í øllum fíggjarætlanum. Rammujáttanir undir ábyrgd hevði spart okkum nógvar milliónir í minkaðari umsiting og kundi spart nógva tíð hjá Løgtinginum, ið átti at havt annað at tikið sær til enn millimeturstýring av landsins stovnum.

Til Torbjørn Jacobsen er bara siga, at hann eins og samgongan og tinglimir annars bert kann fara til arbeiðis og gera ein fíggjarlog sum heldur. Peningurin, ið nú væntar á almanna og skulaøkinum, kundi hóskandi verið tikin av kontoini til almenna umsiting. Harafturat mugu stig takast til at broyta alt ov stirvnu játtanarskipanina, ið yvirumsitur hvønn smálut, soleiðis at ein sparing uppá skallutar tríhundrað túsund krónur mátti heilt upp á tingborð at venda, áðrenn hon kundi fremjast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skattalættin – eitt vælferðarherðaklapp til tey háløntu

**Ingrid S. Henriksen**



Viðmerking til uppskot til skattalætta

Viðv. uppskoti nr. 66 um skattalætta, sum landsstýrismaður Karstin Hansen, vegna Føroya Landsstýri legði fyri løgtingi hin 19. februar 2003.

Uppskotið hevur heitið: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan (ásetingarlógin – skattalætti).

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður frá landsstýrisins síðu sagt, at »lógaruppskotið verður ikki mett at hava nakrar sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir, men **uppskotið vil lætta um hjá serliga miðalinntøkunum í 2003, og hjá bæði lág- og miðalinntøkunum í 2004**«.

Karsten Hansen, landsstýrismaður, segði somuleiðis við blaðið Fregnir 21. til 27. februar 2003, á forsíðuni at »Tá vit gera slíkar broytingar, so fara øll at merkja lættan. Men lættin vendir sosialt rætt, soleiðis at tað eru lág- og miðalinntøkurnar, sum fáa mest burturúr«.

Hesar viðmerkingar landsstýrisins og viðmerkingarnar hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni viðvíkjandi ætlaðu skattalættunum í 2003 og 2004 eru ikki í trá við fylgiskjøl 1, 2 og 3 til nevnda skattauppskot landsstýrisins, har skattalættin verður roknaður út fyri ymsar inntøkubólkar, tað veri seg lág-, miðal- og háinntøkur.

Fólk, ið hava miðalinntøku, og fólk, ið hava inntøku omanfyri 1/2 mió. kr. árliga fáa nevniliga eins stóran skattalætta í 2003, skattalættin er 2.350 kr. árliga. Inntøkur, ið liggja ímillum 160.000 kr. árliga og 530.000 kr. árliga fáa júst sama skattalætta, nevniliga 2.350 kr. árliga, meðan láginntøkur, ið liggja millum 21.000 kr. og 60.000 kr. als ongan skattalætta fáa í 2003 (skattalætti = 0 kr.). Av hesum sæst, at miðalinntøkur og háinntøkur fáa skattalætta í 2003, meðan láginntøkur als ongan skattalætta fáa.

Tá sagt verður, at uppskot landsstýrisins vil lætta um hjá bæði lág- og miðalinntøkum í 2004, er hetta reingjan av veruleikanum, ella í besta føri einans hálvur sannleiki. Fylgiskjal nr. 2 til skattauppskotið vísir greitt, at serliga fólk, ið hava háinntøkur – t.v.s. inntøkur omanfyri 1/2 mió. kr. árliga fáa nógv størsta skattalættan. Tey, ið hava inntøku, ið er 570.000 kr. um árið fáa nevniliga skattalætta, ið er 6.310 kr. frá 2003 til 2004. Meðan fólk, ið hava miðalinntøku, ið er 200.000 kr. um árið fáa 2.6120 frá 2003 til 2004. Fólk, ið eru láglønt – t.v.s. hava inntøku, ið er millum 25.000 kr. árliga og 160.000 kr. árliga, fáa skattalætta, ið liggur ímillum 310 kr. og 910 kr. frá 2003 til 2004.

Uppskot landsstýrisins vísir greitt, at serliga fólk, ið hava høgar inntøkur – t.v.s. tey, ið hava inntøku omanfyri 1/2 mió. kr. árliga, fáa nógv størstan skattalætta sambært fyriliggjandi uppskoti.

Fólk, ið hava ávikavist høga inntøku, miðalinntøku ella lága inntøku fáa sambært uppskoti landsstýrisins niðanfyrinevndu skattalættar í krónum í 2004 og árini frameftir.

DØMI frá fylgiskjali 3:
Tey, ið vinna 530.000 kr. um árið (háinntøka) fáa: **8.260** kr. í skattalætta í 2004 og árini frameftir.
Tey, ið vinna 250.000 kr. um árið (miðalinntøka) fáa **5.460** kr. í skattalætta í 2004 og árini frameftir.
Tey, ið vinna 200.000 kr. um árið (miðalinntøka) fáa **4.960** kr. í skattalætta í 2004 og árini frameftir.
Tey, ið vinna 150.000 kr. um árið (láinntøka) fáa **1.860** kr. í skattalætta í 2004 og árini frameftir.
Tey, ið vinna 100.000 kr. um árið (láinntøka) fáa **1.460** kr .í skattalætta í 2004 og árini frameftir.
Tey, ið vinna 50.000 kr. um árið (láinntøka) fáa **560** kr. í skattalætta í 2004 og árini frameftir.

Viðmerkjast skal somuleiðis, at fyritíðarpensiónistar/avlamispensiónistar, ið fáa lægstu fyritíðarpensión fáa 66.516 í pensión um árið (láinntøka). Hesir pensiónistar fáa 1.292 kr. í skattalætta í 2004 og árini frameftir, sambært fyriliggjandi skattauppskoti.

Staðfestast má, at uppskot landsstýrisins gevur skattalættar til háinntøkur og í minni mun til miðalinntøkur í 2004 og árini frameftir, meðan skattalættin til láinntøkur er lítil og ongin í 2004 og árini frameftir.

Tølini tala fyri seg. Uppskot landsstýrisins vísir, at skattalættin fer til háinntøkubólkar og vendir skattalættin sostatt sosialt skeivt og ikki sosialt rætt sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum vil vera við í blaðnum Fregnir 21. til 27. februar 2003. Eftir er bert at vóna, at løgtingslimir rakna við og broyta skattauppskotið soleiðis, at tað í verki verður í trá við fráboðaðu ætlanina við skattalættanum, nevniliga at tað verða tey lágløntu og tey við miðal inntøku, ið fáa tiltrongdan skattalætta. Tað sigur seg sjálvt, at láglønt, ið vinna minni enn 150.000 kr. um árið hava serstakligan tørv á skattalætta. *Tað átti at verið sjálvsagt, at fólk, ið vinna 1/2 mió. kr. ella meira um árið ikki hava tørv á peningaligum lætta (skattalætta) frá tí almenna. Sum er hava persónar, ið hava inntøku, ið er 500.000 kr. um árið, 252.680 kr. um árið ella 21.056 kr. um mánaðin til avlops eftir at skattur er goldin. Og røkkur henda upphædd ivaleyst til lívsins uppihald umframt til marglætisnýtslu v.m.*

*Meðan fólk, ið vinna 150.000 kr. um árið einans hava 102.180 kr. um árið ella 8.515 kr. um mánaðin til avlops eftir at skattur er goldin og røkkur slík upphædd neyvan til lívsins uppihald – t.v.s. vanligt/neyðugt forbrúk.*

Vert er at nevna, at Herman Oskarsson, búskaparfrøðingur og stjóri á Hagstovu Føroya, tveir dagar eftir at uppskot landsstýrisins varð lagt fyri løgtingið, nevndi í fjølmiðlunum, at skattalætti landsstýrisins var eitt »vælferðarherðaklapp til størri forbrúk«. Hann nevndi onki um, hvør bólkur í samfelagnum skal hava hetta vælferðarherðaklapp til størri forbrúk.

Vónandi og væntandi verður skattastigin broyttur, soleiðis at tað veruliga verða tey lágløntu, sum í alstóran mun hava brúk fyri meiri peningi at lívbjarga sær við (til mat, klæðir, olju, el og bústað), vera tey, ið fáa lovaðan og hart tiltrongdan skattalætta og harvið eitt *»vælferðarherðaklapp til vanligt/neyðugt forbrúk«*.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til Rúna Hentze, løgtingsmann

**Daniel Jacobsen**

Tygun tosað nógv um, at nakrir partrolarar, sum komu í tann føroyska flotan nýliga, øktu um veiðitrýstið. Eg havi ikki hoyrt teg tosað ella sæð teg skrivað um, at ein útróðrarbátur í Skopun knappliga fekk egningarmaskinu umborð fyri nøkrum árum síðani, men tað økti vælsagtans eisini um veiðitrýstið, enntá inni á økjum, sum smábátarnir royna á.

# Maður druknaður



Um hálvgum níggju tíðina mikumorgunin var ein maður funnin druknaður beint við saltsiloina á Vestaru Vág í Havn. Frá politistøðini í Havn verður upplýst, at talan er um ein 51 ára gamlan mann.

Politiið sigur annars, at maðurin hevur helst verið deyður í nakrar tímar áðrenn hann er funnin. Nú verður líksýn, og tá verður orsøkin til vanlukkuna funnin.

**-ib**

## Nøkur minningarorð um

# Jóhannes Olsen



Ja, so fór ein góður vinur, Jóhannes, frá okkum. Eg kom at kenna Jóhannes fyri mongum árum síðan, tað var tá ið eg kom í nevndina hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Gunnar Petersen av Tvøroyri var formaður tá, og Jóhannes var skrivari.

Tað sum eg legði til merkis alt fyri eitt, var at báðir arbeiddu stillisliga og sera væl saman.

Tá ið Gunnar doyði, gjørdist Jóhannes formaður í Føroya Arbeiðarafelag. Jóhannes var ein stillur maður, hann var góður í ráðum og ein gløggur maður.

Ein legði til merkis at tá ið samráðingar vóru, og Jóhannes tók orðið, tá bleiv væl lurtað eftir honum, tí hann dugdi væl at bera síni sjónramið fram og vóru tey altíð dokumenteraði.

Tað kom nær um altíð eitt gott úrslit burtur úr samráðinginum.

Jóhannes var ógvuliga harmur um tá Havnin og Klaksvík fóru burtur úr felagnum. Eg veit, at tað hevði glett hann um øll feløgini fóru at arbeiða saman aftur nú.

Jóhannes var ikki einans hegnigur maður at føra samráðingar til góð úrslit. Hann dugdi eisini væl at yrkja, skriva og at mála.

Tey sum komu at kenna Jóhannes, komu øll at halda av honum. Hann var ein góður vinur, og var altíð við tí góða orðinum.

Jóhannes hevði sína fastu trúgv á sín Frelsara Jesus Kristus. Hann kundi tí syngja:

*Jerúsalem, Guds halga stað!*
*Tann dýrd, ið bíðar teim*
*ið syngja skulu hjartans glað*
*tann dag tey koma heim!*
*Á gøtuni – sum skyggið glar,*
*eg síggi, Jesus, teg,*
*ei sorg og neyð meg níva har,*
*nei, dýrdin fyllir meg.*

Góða Estrid, børn-, abba- og langabbabørn, eg veit at saknurin er stórur, nú Jóhannes er farin. Men tit koma saman aftur á tí stóra uppreistnaðardegnum, og tað verður ein stór gleði tá.

*Har verður frøi, ja, har verður frøi,*
*tí at tey frelstu øll náddu í havn!*
*Har verður frøi, ja, har verður frøi!*
*Skarin skal lovprísa frelsarans navn!*

Æra verður minnið um mín góða vin, Jóhannes

**Símun P. Poulsen**

# Vilgerð Astridardóttir,

## fyrrverandi yvirsjúkrasystir á psykiatrisku deild, farin



Týsnáttina 25.03.2003 andaðist Vilgerð 63 ára gomul aftan á langa og stranga sjúku.

Vilgerð var dóttir teirra Dánial Jacob Hansen úr Frammistovu á Norðoyri og Astrid av Selatræð.

Vilgerð var væl kálvfødd bæði til likams og sálar. Hon gekk í framhaldsskúla í Klaksvík, sum tá á døgum ikki var so mongum ungfólki í sóknini beskorið. Seinri fór hon niður á Bispebjerg Hospital at útbúgva seg til sjúkrasystur, og man tað fyri hana og okkum øll hava verið eitt heppið yrkisval, tá hugsað verður um, hvussu mikið hon hevur lagt eftir seg á tí økinum, sjálv fakliga framúr væl fyri, eins og hon í sínum yrki hevur skorðað væl undir at menna føroyska sjúkrarøkt.

Hon giftist yvir til India og fekk í 1972 við fyrra manni sínum Sohrab Modi einkardóttrina Manijeh. Um hetta forvitnisliga lívsskeið hennara, fjart av landi skotin, hevur staðið grein í føroyskum myndablaði.

Seinri fóru so Modi og Vilgerð sundur, og Vilgerð flutti saman við dóttrini heimaftur á klettarnar, har Vilgerð fekk arbeiði á psykiatrisku deild, og tá deild V varð fingin okkum aftur frá Andveikraverndini og endurreist sum m.a. ellispsykiatrisk deild, gjørdist Vilgerð leiðandi sjúkrasystir har.

Vilgerð hevur altíð havt serligan áhuga og kunnleika í slíkari sjúkrarøkt og meg minnist aftur á, hvussu væl, eldhugað og nærløgd hon fyrireikaði síni starvsfólk til hesa serligu røktaruppgávu.

Tá so nakað seinri yvirsjúkrasystirin yvir allari psykiatriskari deild fór frá fyri aldur, varð Vilgerð við sínum serliga fakliga førleika sjálvsøgd at taka eftir í hesum ábyrgdarstarvi og harvið verða partur av sjálvari depilsleiðsluni.

Samstundis helt hon áfram við at nema sær ískoytisútbúgvingar m.a. innan roknskap, leiðslu og fyrisiting. Hetta var ein trupul tíð at standa á brúnni. Tað var samfelagskreppa við herviligum niðurskurðum á sjúkrahúsøkinum. Samstundis vóru stórar rembingar á sjúkrahúsbygnaðinum, sum skiftandi fremmand konsulentfirma gjørdu sær dælt av við líka so skiftandi loysnum, og ein var so at leggja yvirsjúkrasystrastarvið (og harvið Vilgerð) niður fyri stutt eftir at kúvenda og endurstovna embætið. Men Vilgerð fór so av sjúkrahúsinum med alla og starvaðist eitt skifti sum heimasjúkrasystir, inntil hon, framvegis eldhugað fyri ellissjúkrarøkt, skuldi fara á Lágargarð at arbeiða, men um tað mundið fekk hon sjúku, sum skjótt skuldi vísa seg at vera óbøtandi, og nú bleiv tað til, at hennara langa og stranga ferð at deyðanum umsíðir fekk ein enda.

Vilgerð var ikki bangin fyri at hyggja deyðan í eyguni, og djørv, sum hon var, viðvirkaði hon fyri eini tíð síðani í forvitnisligari og hjartanemandi blaðgrein um sína støðu.

Sjálvur fekk eg tann framíhjárætt í mong ár bæði at samstarva við Vilgerð umframt at hava eitt ósvikaligt vinarlag við hana.

Ikki so at sjógvar ikki brutu millum tvey so bersøgin fólk sum okkum bæði, tó eg ikki minnist sólina seta undan nakrari vreiði okkara millum.

Til tess var Vilgerð alt ov skemtingarsamur, sjálvironiskur og í grundini flógvur persónur.

Og hóast onkuntíð strævið kann tað vera ruddiligast at fáa greið boð í eini tíð, har tað annars tykist vera gott latín sum mest bara at behaga fyri ikki at siga at vera hálur.

Har hon ferðaðist, kveikti hon lív og kjak í, setti fram spískar, viðkomandi fakligar spurningar og var sostatt ein góður sparringspartnari, fakkøn sum fáur.

Og galt tað um at stuðla eini góðari søk, so lá hennara partur ikki eftur, og man Vilgerð sum íbirtari, kveikjari og tilelvari eiga ein stóran part av heiðrinum fyri tí stóru menning, sum føroysk sálarsjúkrarøkt hevur verið fyri serliga hesi seinru árini millum yngri og eldhugað starvsfólk.

Vilgerð hevði stóran áhuga fyri samfelagsspurningum, bæði í politikki og í fakfelagshøpi, har hon gjørdi seg beinleiðis galdandi. Hon var ógvuliga stættartilvitað og Gud náði tann, sum ikki sýndi sjúkrasystrayrkinum og tí stætti nóg frægan ans. Tá kundi hon av álvara reisa uggafjaðrarnar, gerast hvøss, og tað var ikki gamansleikur at vera fyri.

Persónliga eri eg fegin um at hava kent Vilgerð sum klaksvíking, arbeiðsfelaga og ósvikaligan persónligan vin, og eg fekk ongantíð høvi til at ivast í hennara grundleggjandi góðsku og samhaldsfesti.

Fyri nøkrum árum síðani giftist Vilgerð uppaftur við Andriasi Sjóvará av Strondum, og fingu tey eitt gott og harmoniskt, tó tíanverri alt ov stutt lív saman við børnum í báðum giftum.

Vilgerð var ógvuliga góð við Andrias og hansara og ikki minst sína egnu einkardóttur.

Við deyða Vilgerð er ein megnarkvinna farin, men fyri deyðanum má sjálvt hin sterki eisini lúta.

Hon verður sárliga saknað, og okkara tankar leita til tykkum øll og okkum mongu, sum stóðu henni so nær.

Hvíl í friði, góða Vilgerð.

**EyJo**